FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. august 2020
J. nr.: 20/00372
Viðgjørt: MM

Svar upp á fyrispurning nr. 6/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um at flyta fyrisitingina í Vága- og Norðoyatunlinum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongur við ætlanunum at flyta fyrisitingina hjá Vága- og Norðoyatunlinum úr Havn til Runavíkarøkið?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin, at feløgini hava flutt fyrisitingina inn til Runavíkarøkið?

Svar:

Tann 27. juni 2019 undirskrivaðu feløgini P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Tunnil sáttmála við Sp/f Høgabólshúsið um leigu av fyrstu hædd á Heiðavegnum 57, Saltangará. Feløgini halda í dag til á Hoyvíksvegnum 65 í Tórshavn.

Í løtuni verða hølini á Heiðavegnum 57 í Saltangará umvæld, soleiðis at hølini verða innrættaði og klár til tunnilsfeløgini at flyta inn í.

Umvælingin av hølinum er seinka nakað millum annað vegna COVID-19. Eingin útreiðsla til leigu verður at rinda áðrenn hølini eru klár at taka í nýtslu.

P/F Tunnil upplýsir, at leigumálið tekur við tá hølini eru klár at taka í nýtslu, sum í núverandi støðu væntandi verður 1. desember 2020.

Tinganes, 24. august 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum